# um fyri uml. 20 milliónir krónur




Outsider Magazine, #2/3 2006 s. 68, skrivar um søgugongdina:

Mattias er føddur sama dag sum mánalendingin í 1969, men hann vil ikki verða kendur. Hann hevur tað gott sum eitt vælfungerandi tannhjúl í heiminum. Hann elskar sítt arbeiði. Ein kassa við bókum um rúmdarferðir. Hann hevur ein vin sum spælir tónleik og er nøgdur við at vera ein ókendur gartnari. Við eitt verður tilveran vend á høvdið. Aftan á nýggju ár fer daman frá honum. Hann er 30 ár, og hevur mist arbeiðið og situr einsamallur í einari tómari íbúð. Tá vinurin so bjóðar honum til Føroya at hjálpa orkestrinum á eini konsertferð, tekur hann av. Her byrjar alt at detta saman av álvara fyri Matthias, og ferðin til Føroya gerst ein langur roadmovie um hansara brotnaða hjarta og sinn.

Eisini úr somu útgávu frá Outsider Magazine, s. 62:
*Eg havi við vilja lýst einar nýmótans Føroyar fyri at fáa tað fram, at Føroyar eru sum eitt og hvørt annað land við alneti og øllum – fyri at sleppa undan hesum, at fólk sum amerikanarar halda um Norra, at kavabjarnir ganga og mala inni í býunum.*

og leggur afturat, men vit arbeiða hart fyri at hetta skal gerast veruleiki. – Eg meti at møguleikin er 50-50.

So her verður møguleiki hjá lokalum kreftum at sleppa framat. Filmsmentan hevur ta seinastu tíðina veri nógv á breddanum. T.d. hevur SvF havt sendirøðina Agurk, har m.a. innsendir stuttfilmar hava verið vístir, á skránni í nøkur ár nú. Filmsverkætlanin FISK 2006 vísti stuttfilmar á G!. Ein av fyriskiparunum, Mikkjal Helmsdal, heldur at, um hetta verður veruleiki og um føroyingar kunnu sleppa at vera við í eini tílíkari verkætlan, so kann hetta verða við til at lyfta fakliga kunnleikan millum føroyingar. – Nú kenni eg ikki so nógv til hesa verkætlanina, men hetta kann vera við til at fáa førleika til landið. Um vit skulu byggja eina filmsvinnu upp her, so er neyðugt við tílíkum førleika.



*Ungi høvundurin Johan Harstad hevur verið í Føroyum í Vikuskiftinum í samband við bókmentatiltakið á G! Tað er ein 50-50% møguleiki fyri eini stórari sjónvarpsframleiðslu, sum fyri ein stóran part skal ganga fyri seg í Føroyum, vónar Harstad.*

**Seinni í vikuni verður samrøða við Johan Harstad og eisini íslendska høvundan Eirík Ørn Norðdahl, sum báðir eru ungir høvundar – føddir ávikavist í 1979 og 1978. Har fer tað at snúgva seg um skaldligan íblástur frá dagsins tónleiki**